

*Síðan 27. november hevur flakatrolarin Vesturvón ligið við bryggju í Saltangará, men nú verður skjótt klárt at loysa aftur*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

# Hava umbygt verksmiðjuna

**Flakatrolarin Vesturvón hevur seinastu tíðina ligið í Saltangará, har verksmiðjan er umbygd, soleiðis at høgligari verður at arbeiða kongafisk**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er FJM í Runavík, ið hevur staðið fyri arbeiðnum, sum gjørt er á verksmiðjuni umborð á flakatrolarnum Vesturvón. Sum undirveitarar hevur felagið eitt nú havt El-Service á Skála og KJ-Hydraulik á Kambsdali.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at talan er ikki um so ógvuliga stórar broytingar, men so mikið, at tað nú verður lættari at arbeiða kongafisk á verksmiðjuni, tá ið farið verður í Irmingarhavið.

– Vit høvdu ætlað, at skipið loysti aftur umleið 20. januar, men enn er ikki vist, at tað verður so.

Reiðarin sigur, at komandi túr verður farið í Barentshavið, helst í norskan sjógvi, og tá ið februar mánaði nærkast, verður hetta vanliga mett sum góð fiskitíð har eysturi.

Vesturvón hevur ligið í Saltangará síðan 27. november, tá ið skipið kom aftur úr Barentshavinum.

Anfinn Olsen sigur, at tá ið skipið fer avstað aftur, verða stívliga 30 mans umborð.

Tað er P/F Vesturvón, sum eigur flakatrolaran, og Framherji eigur 100% av partafelagnum Vesturvón.

# Fagraberg gjørt roktúr á svartkjaftaveiði

**Kombineraða trol-og nótaskipið Fagraberg hjá Framherja hevur gjørt ein rættiligan roktúr á svartkjaftaveiði undir Føroyum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Fagraberg hevur gjørt enn ein roktúr á svartkjaftaveiði – met í nøgd og helst eisini í veiðivirði av ídnaðarfiski*

3254 tons av svartkjafti.

Tað er størsta nøgd, sum nakar svartkjaftabátur hevur landað í Fuglafirði nakrantíð.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at hetta er ein góður túrur hjá skipi og manning.

– Vit hava selt tey 3254 tonsini fyri umleið 4,5 mió krónur, og tað er rættiliga góð søla til ídnað.

Hann vísir á, at prísurin á fiski til ídnað er góður í løtuni, og tí er hugsandi, at hetta eisini er metsøla til ídnað.

Heimasíðan hjá Norðlýsinum veit frá skiparanum, Høgna Hansen úr Oyndarfirði, at siga, at manningarparturin hendan túrin, sum vardi í 11 dagar, er 65.000 krónur.

– Eg havi ikki roknað uppá hetta enn, so hetta eru ikki míni tøl, sigur reiðarin, sum kortini heldur, at hetta man fara at vera á góðari leið.

Sjálvur heldur hann, at nøgdin hesaferð gjørdist størri enn áður, tí veðrið var so vánaligt upp undir endan av túrinum.

– Tá túrurin fer at halla, og skipið fyllist, kann tað hava týdning fyri stúvingina av fiskinum, um ringt er í sjónum. Við rullinum stúvast fiskurin eisini betur, og tí gjørdist nøgdin hesaferð størri enn nakrantíð áður.

Men, leggur hann aftrat, at talan er helst bara um tað eina prosentið í nøgd á muni á hesum túrinum og onkrum øðrum túri, sum skipið hevur gjørt.

– Fagraberg fór útaftur í gjár, og nú eru teir farnir at leita eftir svarkjafti. Helst byrja teir túrin á somu leið, sum teir góvust, men enn vita teir ikki, um nakar fiskur er á leiðini í løtuni, sigur reiðarin, Anfinn Olsen.

Fagraberg fiskaði í 2006 fyri góðar 80 mió krónur.

# Havtaska liggur ikki bara við botnin og »fiskar«

**Ein havtaska kann ferðast í miðal 3,5 km. um døgnið í 183 dagar. Tað vísa merkingarroyndir, sum Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt. – Hetta merkir, at havtaska liggur ikki bara við botnin og "fiskar", sigur fiskifrøðingurin, Lise Helen Ofstad**

KANNINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskirannsóknarstovan hevur merkt havtasku við trolaranum, Vesturfarinum og garnabátinum, Gudrun.

Endamálið við merkingini, sum Lise Helen Ofstad skrivar um á heimasíðuni hjá stovninum, er at fáa eina vitan um útbreiðsluøki og ferðingamynstur hjá havtasku í føroyskum sjógvi. Endamálið er eisini at finna út av, hvat samband havtaska í okkara sjógvi hevur við grannaøkini.

Vesturfarið fiskaði 260 havtaskur á Skeivabanka í mars 2005, sum vórðu merktar, og garnabáturin Gudrun fiskaði 104 havtaskur norðanfyri Føroyar í mai/ juni 2005, sum eisini vórðu merktar. Aftrat hesum hava teir merkt 40 havtaskur umborð á Gudrun síðan august 2005.

Havtaskurnar vórðu merktar við sonevndum spagetti-merkjum, sum verða skotin inn í ryggin.

Lise Helen Ofstad, fiskifrøðingur, veit at siga, at Fiskirannsóknarstovan hevur fingið 14 merktar havtaskur aftur í 2005. Ein er fingin undir Íslandi, hinar allar undir Føroyum.

– Tað var beint fyri jól í 2005, at Fiskirannsóknarstovan fekk boð úr Íslandi um, at teir høvdu fingið eina merkta havtasku undir Íslandi. Hetta er soleiðis tann fyrsta, merkt í føroyskum sjógvi, sum er fingin aftur í øðrum sjógvi enn føroyskum.

Hon sigur, at havtaskan, sum teir fingu aftur undir Íslandi, er merkt á merkingartúrinum við Vesturfarinum á Skeivabanka, 6. mars 2005.

– Tá hon varð merkt, var hon 43 cm. long, og tá ið hon varð fingin aftur sunnanfyri Ísland 183 samdøgur seinni, var hon 45 cm. long.

Lise Helen Ofstad sigur, at havtaskan varð fingin aftur 343 fjórðingar í beinari linju frá merkingarstaðnum á Skeivbabanka.

– Hetta merkir, sigur Lise, at hon hevur ferðast í minsta lagi 3,5 km. um døgnið, ið er nógv skjótari enn væntað fyri fisk sum havtasku.

Hildið hevur nevniliga verið, at hetta fiskaslagið liggur við botnin og »fiskar« meginpartin av tíðini.

Hetta heldur so ikki heilt, staðfestir fiskifrøðingurin.

– Roknað verður við, at ein toskur av somu stødd sum hendan havtaskan ferðast umleið 18 km. um døgnið.

Hugsa vit um ein kalva av somu stødd sum havtaskan, verður mett, at hesi bæði fiskasløgini kunnu ferðast við umleið somu ferð um somu leiðir.

Lise Helen Ofstad sigur, at 13 merktar havtaskur eru fingnar aftur frá merkingartúrinum við Gudrun.

– Áðrenn tær vórðu fingnar aftur, høvdu tær verið í sjónum í 5-84 samdøgur og høvdu ferðast úr tilsamans 6,5 fjórðingum upp í 45,4 fjórðingar eftir merkingina.



*Gamalt er at siga, at havtaska liggur við botnin og »fiskar« At hon fiskar, verður sagt, tí hon hevur ein langan pinn, sum hevur festið frammarliga á høvdinum og sum hongur fram um kjaftin á henni*

Hon sigur, at havtaskan, sum hevur ferðast longst undir Føroyum, hevði verið úti í 78 dagar og hevði ferðast umleið ein km. um døgnið.

Fiskifrøðingurin sigur at enda í frágreiðingini, at merkingin við Føroyar er partur av eini norðurlendskari verkætlan um havtasku, samstundis sum hetta eisini er ein verkætlan undir fiskivinnuroyndum.

– Miðjað verður eftir at merkja enn fleiri havtaskur í føroyskum sjógvi, eins og arbeitt verður við at taka samanum úrslitini higartil, sigur Lise Helen Ofstad.